# Hittust eftir 30 ár



*Aftara rað frá vinstru standa Jacobina Djurhuus úr Havn, Marin Rasmussen úr Havn og Malan Klein Olsen úr Klaksvík. Fremra rað frá vinstru eru tað Maria Marielsdóttir av Argjum, Joan Michelsen úr Hvalba, Maud Østergaard úr Lorvík og Katrina Borgardal úr Sandvík*

Tað verður meiri og meiri vanligt, at floksfelagir, starvsfelagir og onnur, gera av at hittast aftur eftir langa tíð og skipa fyri samkomum at práta um gamlar dagar og at fregnast, hvussu tað hevur gingist hjá hvørjum øðrum. Tað gjørdu tey eisini, sum tóku sveinaprógv sum frisørar í 1980, ella fyri 30 árum síðani.

Um vikuskiftið gjørdu tær av at savnast í Suðuroy hjá Joan Michelsen, sum var einasti suðuroyingur í hesum árganginum. Tey komu suður leygarmorgunin og koyrdu runt í Suðuroynni og høvdu so eina hugnaløtu um kvøldið, áðrenn tey fóru norður um aftur við Smyrli sunnumorgunin.

Vit avmyndaðu tær leygardagin, tá ið tey vóru í Sandvík og til stuttleika prenta vit eisini sett myndina av teimum, soleiðis sum tey sóu út, tá ið tey tóku sveinaroyndina.



## 30 ÁR SÍÐAN

*Og soleiðis sóu tær út, tá ið tær tóku sveinaroyndina fyri 30 árum síðani. Aftara rað frá vinstru stendur Jacoba Djurhuus. Síðani koma tvær, sum ikki vóru við í Suðuroy og tær eru Malan Eystberg úr Skopun og Oddvør Jacobsen, lærari. Síðani stendur Marin Rasmussen og Malan Klein. Ytst til Høgru stendur Lena Norðfoss av Strondum, sum heldur ikki var við í Suðuroy. Í fremra raði frá vinstru sita Ásla Húsgarð, lærari, sum heldur ikki var við. Men síðani eru tað aftur Maria Marielsdóttir, Joan Michelsen, Maud Østergaard og Katrina Borgardal*

# Frá Svínoy á ólavsøkubuffét



Saman við dóttrini Elmu hava Eydna og Jógvan Edmund á Geilini frá Svínoy í eini 20 ár verið fastir gestir til buffetina á Hotel Føroyum. Í ár er versonurin Andras eisini við

– Buffetin er ótrúliga góð. Hon skuffar næstan ongantíð. Annars høvdu vit ikki komið aftur, sigur Eydna.

Ja, her er so ótrúliga stórt úrval. Eg eri serliga spentur upp á alt sjógæti, ið tey borðreiða við so sum kalvi, hummari, øða, jákupsskeljar og ymiskt annað. Døgurða og kjøt fáa vit okkum sjáldan, tí tað fáa vit nokk av, tá vit eru bóndahjún úti í Svínoy, sigur Jógvan Edmund.

– Eg eri serliga imponerað av dessertini, har tey millum annað borðreiða við stikkilsberum, sum eg ikki síggi nógva staðnis, sigur Elma, ið saman við manninum Andras Ortind býr í Keypmannahavn.

## TØKK

Hjartans tøkk til øll sum vístu samkenslur og hjálpsemi tá góða mamma, omma og langomma okkara

**Aska Maria Jensen**

doyði og varð jarðað.
Ein serlig tøkk til tykkum á Tjarnargarði og E3 fyri umsorgan. Takk til prestarnar fyri troystarrík orð, fyri peningagávu til sclerosufelagið og til tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

***Familjunar vegna***

***Lilja***

## TØKK

Øllum tykkum, ið á ymsan hátt sýndu okkum samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Hildigunn Hákunardóttir Dam Jacobsen**

andaðist og varð jarðað, takka vit hjartaliga.

***Katrin, Hugin, Hildigunn, Ravnur, Hjørdis, Milja og Henrik***

## Tøkk

Vit ynskja at takka so hjartaliga fyri umsorgan, samkenslu og hjálpsemi, tá ið okkara elskaði maður, pápi, verpápi og abbi

**Mikkjal Joensen**
**Maskinmeistari**

So brádliga andaðist 1. páskadag.

Ein serlig tøkk til tykkum grannarnar í Geilini, sum gjørdu tað so fjálgt hjá okkum at koma heimaftur til Klaksvíkar.
Vit ynskja at takka tykkum øllum, sum á ymiskan hátt hava minst til okkum hesa tíðina.
Eisini takka vit øllum, sum vóru við til at gera jarðarferðina so vakra og heiðurliga.

***Lissan, Jóhanna og Ási***
***við familjum***